# Atlantic Petroleum er nú skrásett á VMF og ICEX

**Tíðindaskriv**




*Wilhelm Petersen, stjóri: -Tað gleðir okkum at verða fyrsta føroyska fyritøkan á VMF, og fyrsta útlendska fyritøkan á ICEX, og gleða okkum til eitt gott samstarv í framtíðini*

*Myndir Jensk K Vang*

Partabrøvini hjá P/F Atlantic Petroleum vórðu skrásett á Virðisbrævamarknaði Føroya (VMF) og ICEX mikudagin 15. juni. Hetta vóru fyrstu føroysku partabrøvini á VMF og ICEX.

Á tíðindafundi í Tórshavn mikumorgunin 15. juni varð skrásetingaravtalan undirskrivað av Atlantic Petroleum, ICEX og VMF. Fyrsti handilin við partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum fór fram, tá ið marknaðurin lat upp kl. 11.

Skrásetingin av Atlantic Petroleum er byrjanin til partabrævahandil á Virðisbrævamarknaði Føroya í samstarvi við ICEX. Sigurd Poulsen, stjóri hjá VMF, staðfesti m.a. hetta tá avtalan varð undirskrivað: »Hetta er ein søguligur dagur fyri føroyska virðisbrævamarknaðin. Atlantic Petroleum hevur gingið á odda við at skráseta seg á okkara marknaði og vóna vit, at aðrar føroyskar fyritøkur fara at nýta sama møguleika í framtíðini.«

»Vit vóna at skrásetingin av Atlantic Petroleum fer at verða grundarlag undir einum sterkum føroyskum virðisbrævamarknaði«, staðfesti Thordur Fridjonsson, stjóri fyri ICEX. »Hetta er fyrsta fyritøkan, ið verður skrásett grundað á avtaluna millum ICEX og Virðisbrævamarknað Føroya, og er hetta ein týðandi hending. Vit vilja ynskja Atlantic Petroleum hjartaliga vælkomnum«.

Wilhelm Petersen, stjóri hjá Atlantic Petroleum, staðfesti m.a.: »Tað gleðir okkum at verða fyrsta føroyska fyritøkan á VMF, og fyrsta útlendska fyritøkan á ICEX, og gleða okkum til eitt gott samstarv í framtíðini.«

Atlantic Petroleum varð stovnað í 1998 sum fyrsta føroyska olju- og gassfyritøkan.

Nominella virðið av øllum partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum er 73.997.800 krónur.

Í løtuni eru 84.9% av partabrøvunum og atkvøðurættinum hjá felagnum ognað av generellum íleggjarum. Skrásetingin av partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum varð samskipað av Kaupthing Bank hf. - Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F. Prospektið hjá Atlantic Petroleum, prísir á virðisbrøvum og aðrar upplýsingar eru at finna á www.vmf.fo og www.icex.is.

SKEMMAN

SØKIR HANDILSLÆRLING

**Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar fyrimunir!**

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estland. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 650 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark.
Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jyllandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanligan handilsútbúgving.
Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byjra?**
Lærlingurin skal byrja 1. september.

**Hevur hetta tín áhuga:**
Send so eina skrivliga umsókn **innan 9. juli** til:

SKEMMAN

Staravegur 7 · Postboks 3278 ·110 Tórshavn
Tel.315588 · Mail: skemman@skemman.fo

Sosialurin 341800

# Løgmaður fegnast um virðisbrævamarknað

**-Virðisbrævamarknaður Føroya virkar fyri at skapa atgongd til fígging hjá vinnuni. Hetta fegnast vit um. Hinvegin mugu vit ásanna, at atgongdin til vágafúsan kapital í breiðari merking er ikki nøktandi í Føroyum – ikki minst tá talan er um fígging til íbirtarar. Vit mugu tí framhaldandi arbeiða fyri at menna fíggjarskipanir, sum kunnu birta upp undir nýskapan**

VIRÐISBRÆVA-MARKNAÐUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hetta segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður m.a. til hátíðarhaldið í sambandi at Atlants Kolvetni varð skrásett á VMF/ICEX mikudagin. Løgmaður leitaði fyrst aftur í tíðina:

– Danbjørg, sáli, skuldi einaferð taka soleiðis til orðanna á tingi, at tað var ikki til at fáa eygað á eina erliga sosialistasál fyri tí bera kapitalistamjørka, sum tá valdaði. Hvat sami Danbjørg hevði sagt í dag, er ikki ringt at gita. Men soleiðis broyta tíðirnar okkum øll. Nýggjar tíðir – nýggjar avbjóðingar – nýggjar hugsanir. Sjálvt tað góða »latíni« broytist. Tí er tað ein heiður fyri meg, sum løgmaður, og enntá, sum sosialdemokratiskur løgmaður at bera fram eina røðu í dag.

Hvat er politikkur? Stutta útgávan er, at politikkur snýr seg um vælferð. Hóast ymisku flokkarnir kunnu hava ymiskar tilgongdir og uppfatanir av, hvat vælferð er, so eru allir flokkar samdir um, at málið er at skapa vælferð.

Vit eru eisini samd um, at vælferðin als ikki kemur av sær sjálvum. Hon er ikki ein gáva, men hon er eitt mál, sum stríðast skal fyri. Og vælferðin hevur harumframt ein fíggjarligan kostnað og í nógvum førum ein stóran kostnað. Tí er tann longra útgávan av, hvat politikkur er, at hesin snýr seg um vælferð, búskap og vinnu.

Skulu vit megna at fíggja eina góða vælferð, mugu vit hava ein sterkan búskap, og hesin hevur brúk fyri einari sterkari vinnu, sum kann skapa neyðugan vøkstur og inntøkur til samfelagið.

Ynskja vit vælferð, so ynskja vit eisini ein sterkan búskap. Ynskja vit ein sterkan búskap, so ynskja vit eisini eina sterka vinnu.

Onkuntíð hava vit lyndi til at »stinga høvdið í sandin«, tí vit vilja ikki síggja veruleikan, sum hann er, ella tí vit halda, at tað »gongur nokk«.

Vit noyðast tó at viðurkenna, at vit eru komin fram á fleiri týðandi vegamót, ið krevja, at stórar politiskar avgerðir verða tiknar. Hesi vegamót reka inn á okkum, um vit vilja tað ella ikki. Spurningar sum altjóðagerð, okkara samstarvsviðurskifti við ES og EFTA, einskiljingar og framtíðar vinnubygnaður segði løgmaður og helt fram:

## Rættar avgerðir takast

– Eitt er so vist, at lata vit standa til verða vit so dyggiliga afturútsigld. Ein alsamt harðari altjóða kapping frá láglønarlondum hevur við sær, at kappingarfórið dragnar.

Í størri og størri mun kasta londini rundan um okkum saman í tætt búskaparligt samstarv. At standa uttan fyri gerst altsamt truplari.

Tí mugu avgerðir takast – rættar avgerðir. Vit mugu seta út í kortið, og vit mugu vera framsøkin við greiðum ætlanum, sum kunnu menna okkara samfelag.

Tað var í hesum anda, at landsstýrið um ársskiftið setti sær fyri at gera eina heildarætlan ella strategi fyri samfelagið. Talan er um meiri enn eina ætlan, soleiðis sum vit vanliga skilja hetta hugtak, tí setast skulu greið mál og greiðar tíðarætlanir fyri, nær málini skulu vera rokkin. Visjónin er, at Føroyar skulu vera millum fremstu lond í 2015, og strategiin er uppskriftin, sum skal føra okkum hagar.

Hugsanin og endamálið við Strategi 2015 er at skapa karmar fyri búskaparvøkstri – varandi búskaparvøkstri, soleiðis at tað eisini í framtíðini verður peningur tøkur til framhaldandi at menna okkara vælferðarskipanir.